## Skjót avgreiðsla

**Lerwick:** Hóast spælið í dystinum móti Grønlandi í løtum ikki var av tí allarbesta, sum tað føroyska manslandsliðið hevur sýnt, so tóktist føroyski hevarin, Bárður B. Mikkelsen, sera væl nøgdur um úrslitið.

- Tað, sum hevði størsta týdningin, var sjálvandi, at stigini vórðu fingin til høldar. Og hartil var tað eisini gott, at vit kláraðu tað í trimum settum. Vit høvdu jú ein dyst frá í morgun í beinunum, og sjálvt um hesin ikki var serliga strævin, so ger tað dagin sera langan og tungan.

- Hartil varð hesin dysturin tann seinasti á kvøldinum yvirhøvur, og longu tíðliga í morgin skulu vit aftur spæla. So tað er týdningarmikið, at vit sleppa í song sum skjótast. Vit mugu jú vera so væl fyri, sum tað á nakran hátt ber til, tá vit í morgin skulu spæla móti Álandi.

Men hóast tit eru nøgdir, so sá tað í løtum út til, at frustratiónir vóru at hóma í spælinum. Er tað bara ein náttúrlig avleiðing av, at alt ikki gongur heilt eftir vild, tá møðin eisini fer at gera um seg.

- Tað er tað kanska. Men trupulleikin var eisini, at vit ikki hoyrdu hvønn annan. Vit tosaðu nakað um hetta, og tá vit ístaðin fóru at hyggja meira uppá hvønn annan, gekk tað betri.

Men er ein larmandi høll ikki júst tað, sum helst vil hava í slíkum dystum.

- Sjálvandi. Men tað er so eisini nakað, sum tú skalt venja teg við. Tað verður neyvan friðarligt í morgin, tá vit skulu spæla móti Álandi, so vit kunnu nokk akkurát tað sama læra tað nú, helt Bárður at enda.

**-jm**

Føroyar-Bermuda 3-0 (25-10, 25-21, 25-19):

## Avslapping hjá kvinnunum

**Lerwick:** Heldur ikki mánadagin var talan um nakra serliga trupla uppgávu hjá føroysku flogbóltskvinnunum.

Dysturin hesa ferð var móti Bermuda, og tað tók ikki meira enn fimm korter, áðrenn hesar vórðu ruddaðar av vegnum.

Serliga í fyrsta settinum settu føroysku kvinnurnar dagsskránna, og tó at talan ikki gjørdist um somu einvegis uppvísing eftir hetta, so komst tað einamest av, at okkara tóku sær meira av løttum.

Hóast tað soleiðis hevur verið talan um lættar uppgávur fyrstu dystirnar, so er einki at ivast í, at hesar eisini koma væl við. Ikki minst hava nýggju kreftirnar tørv á at fáa nakrar dystir og nakað av sjálvsálitið við í viðføri til truplu uppgávurnar, sum heilt víst fara at koma.

**-jm**

Føroyar-Hetland 3-0 (25-8, 25-11, 25-15):

## Á byrjunarstøði

**Lerwick:** Tað eru ikki meira enn 12 mánaðir síðani, at flogbóltur millum menn gjørdist aktuellur her á Hetlandi. Hetta var einamest, tí oyggjarnar fegnar vildu verða partur av oyggjaleikunum í hesari ítróttargreinini eisini, men tað merkir ikki, at hetlendingar megna at gera nakað serligt við hini liðini.

Hjá føroysku monnunum varð dysturin helst eisini einamest nýttur sum eitt høvi at strekkja sær beindini mánamorgunin, og fingu okkara sveittan fram, so mundi hetta heldur vera av upphitingini enn av dystinum.

**-jm**



*Í longum løtum av dystinum riggaði føroyska spælið als ikki eftir vild, men tað eydnaðist kortini at basa Grønlandi við trimum settum móti ongum*

Føroyar-Grønland 3-0 (25-15, 25-21, 25-22):

# Kom so við Álandi

**Grønlendingar vunnu heldur ikki á Føroyum hesaferð, men mótstøðan úr stóru oynni harðnar fyri hvørja ferð**

FLOGBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** Eftir lætta sigurin á Hetlandi fyrr um dagin, høvdu menninir eina heldur truplari uppgávu, tá teir í seinasta dystinum á kvøldinum skuldu royna seg móti Grønlandi.

Ikki tí. Grønland hevur enn ongantíð roynt at vinna á Føroyum, og tað gjørdu teir heldur ikki hesaferð. Men í nógvum førum hevur talan verið um sera javnar dystir, og hóast settini siga 3-0, so var talan als ikki um nakran lættan sigur hjá okkara monnum.

Fyrsta settið gekk annars uttan stórvegis trupulleikar. Rúni, Jón og Bartal skiftust um at smasha seg fram við grønlendska blokkinum, og hóast spælið sum heild ikki koyrdi heilt optimalt, so tóktist hetta vera nóg mikið til ein hampuliga tryggan sigur.

Tað kom tó spakuliga kinkur í føroyska spælið. Grønlendingarnir fingu spakuliga blokkin at standa betri, og hetta smittaði sjálvsagt víðari í spælinum. Móttøkurnar gjørdust betri, og í fleiri førum kom føroyska liðið undir veruligt trýst.

Frustratiónir tóktust eisini at koma í spælið hjá okkara, sum als ikki tóktist eins komfortabult. Oftani varð styrkin nýtt heldur enn skilið, og kendu grønlendingar sína vitjunartíð, so kundu teir helst havt tikið okkurt settið.

Men fyri tað mesta eydnaðist kortini at halda grønlendska liðnum aftan fyri, og í einstøkum rykkum fingu okkara so eisini togað seg avgerandi pettið frá mótstøðuni. Og so skerst ikki burtur, at ein stórur munur millum Føroyar og Grønland eisini var, at Rúni Weihe er í okkara parti. Ikki minst kom hetta greitt fram seinastu løtuna av triðja settinum. Tá avgerandi bóltarnir skuldu vinnast, hevaði Bárður yvir til komandi liðfelagan, sum eisini var ósvikaliga tryggur hvørja ferð.

Tvey stig afturat kontini komu til høldar, og so var bara at kvika sær heim undir brúsuna og í song, soleiðis at menn kundu vera so hvíldir sum gjørligt undan næsta dystinum, sum var á skránni týsmorgunin. Og týskvøldið verður so stóri dysturin í bólkinum. Tá fara Føroyar og Áland at takast í oddabrakinum. Ein dystur, sum eisini ger av, hvørt liðini skulu møta Saaremaa ella Bermuda í hálvfinaluni.

Føroyar-Orkney 3-0 (25-9, 25-5, 25-8):

## Skjótt prosess

**West Mainland:** Føroysku flogbóltsmenninir høvdu skund, tá teir týsmorgunin spældu móti Orkney.

Orsøkin var einamest, at teir um kvøldið skuldu spæla avgerandi dystin í bólkinum ímóti Álandi, og tí ráddi um at spara sum mest av krúti til ta uppgerðina.

Og hetta eydnaðist til fulnar, má sigas. 47 minuttir var alt, sum okkara menn nýttu til uppgávuna, og tá hevði Orkney so bara vunnið 22 bóltar.

Og so er at vóna, at hetta var júst tann byrjanin upp á dagin, sum okkara høvdu tørv á. Í øllum førum er støðan í so máta meinlík hjá Álandi, sum eisini hevði dyst á skránni týsmorgunin. Tá vunnu teir upp á 49 minuttir 3-0 á Hetlandi, og so verður spennandi at síggja, hvat av teimum báðum oddaliðunum rakar dagsformin týskvøldið.

**-jm**